## 100 mill V8 motorar



Í mai/juni í ár hava Ford framleitt 100 milliónir V8 motorar. Í Detroit framleiða Ford ein motor fyri hvørt 18. sekund í støddini 5,4 til 6,8 litur.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ókeypis brennievni



Øll tey sum keypa ein nýggjan Rover ella MG í Bretlandi, áðrenn mars mánaði er úti, fáa ókeypis brennievni restina av árinum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mazda í Japan



Mazda framleiddu í fjør 773.798 bilar í Japan, harav 57.301 vóru arbeiðsbilar. Útflutningurin hjá Mazda vaks við 8,8 prosentum.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Renault Mégane II – ársins bilur í Evropa

**Renault Mégane II sær út til at koma væl frá byrjan. Fyrst bleiv bilurin valdur til "Car of the Year 2003", síðan fekk hann 5 stjørnur í EuroNCAP krasjtestunum. Mégane II hevur smart og annarleiðis design**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Renault Mégane II við 5 hurðum. Annarleiðis og smart design. Seinastu modellini hjá Renault hava víst, at teir tora at ganga sínar egnu leiðir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Við Renault Mégane II vilja fransmenn bróta við pástandin um, at allir nýggir bilar líkjast. Seinastu modellini hjá Renault hava víst, at teir tora at ganga sínar egnu leiðir. Nýggi Mégane líkist nógv teimum stóru Renault luksusbilunum Avantime og Vel Satis. Teir bilarnir verða ikki seldir um okkara leiðir. Mégane er gjørdur yvir ein heilt nýggjan plattform, ið er gjørdur í samstarvi við Nissan. Í fyrstu atløgu kemur nýggi Mégane II í útgávum við 3 og 5 hurðum.

Tað er ikki bert útsjóndin sum er nýggj og annarleiðis. Tað er ikki uttan orsøk at Mégane II fekk 5 stjørnur í EuroNCAP testunum, hann er fyrsti bilur í heiminum við "Submarining"-airbag í framsetrunum, ein skipan ið forðar fyri, at bilførarin og síðumaðurin kunnu glíða úr trygdarbeltunum undir eini harðari uppbremsing ella í eini ferðsluvanlukku. Síðu- og gardinairbag eru eisini standard. Tríggir bensinmotorar frá 98 til 140 hk og tveir dCi dieselmotorar við ávikavist 80 og 120 hk verða at velja ímillum.

Bilurin er væl útgjørdur við t.d.fjarstýrdum sentrallási (separat til baklúkuna) aircondition við køling av handskarúmi, elektorniskan oljuniveau mátara. Eins og á Renault Laguna verður Mégane II settur í gongd uttan startlykil, men við einum korti, SmartCard. Bilurin hevur eisini elektroniska servostýring. Undirvognurin er eisini nýggjur og bilurin koyrir væl, er lættur at stýra og stúttur í svingum. Mégane II fæst í útgávunum Authentique, Expression og Dynamique. Mégane II bleiv kosin ársins bilur í Evropa 2003. Ein av orsøkunum til at hann bleiv ársins bilur, var at hann hevur framúr góðar koyrieginleikar og nýskapandi og smart design.




*Renault Mégane II. Designið aftan er møguliga nakað, man skal venja seg við, men smart er tað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Renault Mégane II innan. Stóra aksilfrástøðan ger, at bilurin er rúmligur og hevur gott beinpláss. Mégane verður settur í gongd við SmartCard*

RENAULT

### Renault Mégane II 1,6 Expression Comfort

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1.6 litur 4 syl. bensin 115 hk |
| 0-100 km/t: | 10,9 sek |
| Bensinnýtsla: | 14,7 km/l |
| Dekkstødd: | 195/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd: | 421,0 cm |
| Breidd: | 178,0 cm |
| Hædd: | 146,0 cm |
| Eginvekt: | 1150 kg |
| Viðførisrúm: | 330 litrar |
| Prísur: | Umleið kr. 215.000 |
| Søluumboð: | VR Bilar<br>Hoyvíksvegur<br>FO-100 Tórshavn<br>322110 |

# ítróttur

Nr. 35 • hósdagur • 20. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ungu menninir standa seg væl

**Jógvan Martin Olsen sigur venjingarstøðuna hjá føroysku leikarunum vera á einari góðari leið, men at einstakir spælarar burdu verið betri fyri.**

LANDSLIÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*



*Hjálparvenjarin hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, Jógvan Martin Olsen, letur væl at teimum ungu leikarunum á venjingarleguni í Spania. Eisini hevur hann rós at bera skálamanninum, Jonhardi Frederiksberg, ið eisini hevur staðið seg væl.*

*Mynd: Savnsmynd*

Bæði Ingi Højsted og Jann Ingi Petersen hava staðið seg rættiliga væl á venjingarleguni í Spania. – Teir ungu hava markerað seg rættiliga væl á ferðini, og standa onki aftanfyri teir eldru leikararnar, sigur Jógvan Martin Olsen úr Spania.

Hjálparvenjarin hevur eisini rós at bera Jonhardi Frederiksberg, sum rættiliga óvæntað varð úttikin í síðstu løtu.

– Eg havi vant Jonhard á fleiri ungdómslandsliðum, og tá stóð hann seg altíð sera væl, og á venjingarleguni hevur gingið væl hjá honum, sigur Jógvan Martin Olsen.

### Fleiri smáskaðar

Teir tríggir Jákup á Borg, Jóhannus Joensen og Julian Johnsson hava allir havt smáskaðar at dragast við, og tí hava teir ikki vant við fullari ferð í Spania. Teir eru nú við at koma fyri seg, og væntandi verða teir allir við í seinna venjingardystinum fríggjadagin.

Avtala er gjørd við eitt russiskt lið um dyst seinnapartin fríggjadagin. Russiska felagið spælir í fremstu deildini.

Í dystinum ímóti Bryne sunnudagin sluppu allir leikararnir at royna, uttan HB-málverjin, Bárður Johannesen. Jógvan Martin Olsen sigur, at Bárður við vissu fær leiktíð ímóti russiska liðnum fríggjadagin

### Venjingarstøðan á einari góðari leið

Venjingarstøðan hjá føroysku leikarunum, sigur Jógvan Martin Olsen vera á einari góðari leið, og vísur tó á, at einstakir leikarar burdu verið betri fyri.

Tað hevur verið nógv venjing við bólti í Spania, og dentur hevur serliga verið lagdur á at venja røtta flytingarnar í nýggju spæliskipanini 4-4-2, Venjingarumstøðurnar í Malaga eru framúr, og venjingarnar hjá landsliðnum hava ginigið sera væl higartil.

Tað eru í løtuni fleiri feløg á venjingarlegu í Malaga, og góðu umstøðurnar gera, at feløgini venda aftur ár eftir ár. Føroyingar búgva hesaferð á hotelli saman við felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Molde, og russiska stórfelagnum Dinamo Moskva

### Nógvir skótar

Tað eru heilt fitt av fótbóltsskótum og fylgja teimum mongu liðunum á venjingarlegu í Malaga. Fótbóltsskótarnir koma úr nógvum ymiskum feløgunum, og teir fylgja eisini við føroysku leikarunum.

Hjálparvenjarin, Jógvan Martin Olsen, vísur á, at tað er rættiliga vanligt, at fótbóltsskótar eru at síggja á slíkum venjingarlegum, og tað ger tað tess meira spennandi at vera leikari á slíkari venjingarlegu.

Todi Jónsson:

# -Eg má bara góðtaka støðuna

**Fleiri feløg eru áhugaði í at leiga Toda frá FCK í vár**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Hóast Todi Jónsson fær keðiliga viðferð í FCK í løtuni, so ásannar føroyingurin, at tað ikki er tað stóra, hann kann gera fyri at broyta støðuna.

– Fótbóltsheimurin er kaldur og kyniskur, og tí má ein bara góðtaka treytirnar, sigur Todi við Sosialin.

Spurdur um hann er argur inn á viðferðina, hann fær av FCK, svarar Todi, at tað kann hann ikki vera, tí felagið hevur rætt til handfara støðuna sum teimum lystir, og tí má hann bara góðtaka teirra treytir.

### Møguligur leigusáttmáli

Danskir fjølmiðlar hava víst á møguleikan hjá FCK at leiga Toda Jónsson út til annað felag í vár. Sjálvur vil Todi ikki útihýsa møguleikanum.

– Tað eru 10 dagar til marknaðurin í Skandinavia letur aftur, og tí kann væl henda, at eg verið útleigaður

Spurdur um hann hevði nakran ítøkiligan fyrispurning, svarar Toda, at nøkur SAS-liga lið hava sýnt honum áhuga, eins og onnur feløg í Skandinavia.

Sjálvur vil føroyingurin helst vera í FCK restina av sáttmálaskeiðnum, og royna at spæla seg á liðið aftur, men hann ásannar, at útlitini fyri tí ikki eru av teimum bestu.

### Fýra mans venja

Í løtuni, meðan restin av FCK-hópinum er á venjingarlegu í Suður-Afrika, venja Todi og tríggjir aðrir leikarar í Danmark.

– Eg, Pascal Simpson og Hjalte Nørregaard hava allir valt ikki at undirskriva nýggjan sáttmála við FCK, og tí venja vit og ein unglingaspælari saman í løtuni, greiðir Toda frá.

Spurdur um tað ikki kennist hugtungt, at einans at venja fýra mans, svarar føroyingurin, at soleiðis eru korini einaferð, og tí má støðan bara góðtakast. Umframt at venja við teimum trimum, roynir Todi at venja nakað sjálvur, so venjingarstøðan verður so góð gjørligt.

Hvussu verður og ikki, so verður spennandi um Toda fer at umboða annað felag enn FCK í vár, ella um hann má taka til takkar við at vera fullkomiliga útihýstur í FCK restina av sáttmálaskeiðnum.



*Í løtuni venja Toda og tríggir aðrir leikarar í Danmark, meðan restina av FCK-hópinum er á venjingarlegu í Suður-Afrika*

*Mynd: Savnsmynd*